# Vit við

*Jólamánaðin er besta bókatíðin og í bókahandlunum finna vit altíð eina góða bókagávu. Vit hava kannað, hvørjar bøkur á donskum og enskum heilt vist fara at selja væl í ár. Her skuldi borið til at funnið eina gávu til ein og hvønn.*

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*




***Cash,*** *Jens Lapidus.* Vælskrivað Stockholm-noir skaldsøga um skipaðan kriminalitet í svenska undirheiminum




***Headhunterne****, Jo Nesbø,* Tú heldur andanum til síðstu blaðsíðu – verður samanborin við Brown, Larsson og Grisham




***Sindets tremmer,*** *Einar Már Guðmundsson.* Ein klók og poetisk kærleikssøga úr misnýtsludíkinum




***På udkig efter Hemingway****, Leif Davidsen.* Ein spennandi njósnarasøga av besta slag!




***A Mercy****, Toni Morrison.* Snøgt sagt bókin, sum øll tosa um!




***Barden Beedles eventyr****, J. K. Rowling.* Mamma Harry Potter er á bókahillini aftur. Yvirskotið av søluni fer til Children´s High Level Group, sum hjálpir børnum í neyð




***Glade børn med højt selvværd****, Dan Svarre.* Ein vegleiðing til foreldur um, hvussu tey kunnu styrkja sjálvsvirðið hjá barninum




***1080 opskrifter****. Ines Ortega.* Hendan bókin eigur sítt natúrliga pláss í køkinum, hjá teimum, sum elska spanskan mat. Nógvar litríkar og lekrar myndir




***Mærsk Mc-Kinney Møller.*** *Thomas Larsen og Finn Mortensen.* Ein persónlig vangamynd av stóra vinnulívsmanninum. Hetta er fyrstu ferð Mærsk-McKinney Møller fortelur sína egnu søgu




***En plads i solen****. Liza Marklund.* "Nógv tann besta bókin eftir svensku krimidrotningini higartil.." - Børsen




***Jeg var en virkelig god mor, før jeg fik børn****. Trisha Ashworth og Amy Nobile.* Ein uppbyggjandi bók, sum eggjar mammum til at stuðla og at vera erligar móti hvørji aðrari




***Dinosaurens fjer****. Sissel-Jo Gazan.* "Dinosaurens fjer er nakað av tí besta, sum eg leingi havi lisið. Í hesi bók flýgur Sissel-Jo Gazans hægri enn nakrantíð." - Katinka Bruhn, Weekendavisen